Veðrið

Fimmdagaforsøgnin frá DMI

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Gul til stívt andøvsgul av vestri og útnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 3 og 6 stig.



Veðrið hósdagin:
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi og fyrrapartin møguliga regn, annars sólglottar. Hitin millum 6 og 9 stig.



Veðrið fríggjadagin:
Hann veksur vindin upp í hvassan vind ella skrið av vestri og regn. Seinnapartin skrið av útnyrðingi og ælingur. Hitin fellur niður í 2 til 5 stig.

Veðrið leygardagin og sunnudagin:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av vestri, seinni hækkar hann upp í norðan. Ælingur, partvís vátaslettingur og hitin millum 1 og 4 stig.

Síðani 1990 hevur Rokkjallarin í Havn selt brúktar búnýtir o. a. fyri fólk. Umsetningurin var størri í ringu tíðunum, men nú Sigtór Andreassen hevur selt sín part av húsunum við Tinghúsvegin í Havn, hevur hann gjørt av at lata handilin aftur
Mynd: Jens Kristian Vang

Rokútsøla í Rokkjallaranum

Á ein hátt kann sigast, at góðu tíðirnar hava tikið grundarlagið undan Rokkjallaranum í Havn. Sigtór Andreassen hevur fingið aðrar avbjóðingar - og handilin letur aftur 1. mars

EIRIKUR LINDENSKOV

Tann 1. mars verður lykilin snaraður í Rokkjallaranum í Havn, sum síðani 28. mai í 1990 hevur selt gamlar lutir - fyrst og fremst gamlar møblar fyri fólk, ið hava sett lutirnar til sølu í hølunum hjá Rokkjallaranum.

Tað er Sigtór Andreassen, sum síðani oktober 1993 hevur rikið handilin. Bróðir hansara, Jóannes Andreassen, byrjaði handilin í gomlu handilshúsunum hjá Idé Møblum á Hálsi. Síðani flutti handilin í bygningin hjá Frants Restorff, har heilsølan hjá Niels Johannesen helt til í gomlum døgum. Men í oktober 1993 brann bygningurin í grund.

Tá tók Sigtór Andreassen yvir handilin, og byrjaði umaftur í lítlum kjallarahølum úti í Bakka, men seinni flutti hann í egin høli á Tinghúsvegnum í Havn, har Demich helt til fyri nøkrum árum síðani.

– Nú sølan er minkað, og kanska eg eisini eri vorðin troyttur av hesum, havi eg valt at royna okkurt annað, sigur Sigtór Andreassen, sum kortini leggur dent á, at tað er pláss fyri slíkum handli.

Tað er teldufyritøkan Formula Føroya, sum hevur keypt partin hjá Rokkjallaranum av húsunum við Tinghúsvegin, og er ætlanin eisini at brúka tann partin av húsunum til internetvirksemi. Frammanundan er teldukafé'in, Orbits, í húsunum.

Sigtór Andreassen sigur, at hann fer at boða fólki frá, sum eiga lutir í handlinum, at tey mugu heinta teir innan 1. februar. Tá ætlar hann at selja alt út við stórum avsláttri - og 1. mars skal alt vera úti, tí tá tekur Formula Føroyar yvir bygningin.

Sigtór Andreassen sigur, at sølan hjá Rokkjallaranum er minkað, so hvørt tíðirnar eru broyttar. Hann heldur eisini, at stóru møblahandlarnir selja innbúgvið so bíliga, at fólk velja heldur at keypa nýtt.

— Fert tú niðan á brennistøðina at hyggja, so sært tú, at nógvir góðir lutir verða tveittir burt, sum kanska fyrr høvdu endað í Rokkjallaranum, heldur Sigtór.



Hátrýstið vestan fyri Skotland fer spakuliga í landsynning og viknar.



Lágtrýstið við Scoresbysund fer í landsynning eystan og hevur sum frálíður kaldari luftrák móti Føroyum við sær.



Hitalagið mált frá 17./01. kl 06⁰⁰–18./01. kl 06⁰⁰. Hitin í gjár: 8,1°C
Minsti hiti máldur í jan.: **÷8,8°** Mesti hiti máldur í jan.: **11,6°**



Avfallið: <0,1 mm – **mált frá 17./01. kl 6⁰⁰–18./01. kl 06⁰⁰**
Avfallið higartil í januar: 108,9 mm

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	÷14
Nuuk	÷8
Qaqortoq	3
Ammassalik	÷3
Saint John's	–
Halifax	–
Reykjavík	5
Seyðisfjørður	4
Tórshavn	9
Lerwick	7
Aberdeen	10
London	6
Tromsø	2
Bergen	6
Oslo	–
Stokkhólm	4
Keypmannahavn	9
Helsinki	÷5
Moskva	–
Berlin	7
Warzawa	3
Kiev	÷1
Bukarest	1
Paris	7
Madrid	7
Róm	8
Malorca	12
Athen	11
Malta	14
Tunis	12
Beijing	0
New Dehli	18
Bangkok	31
Jakarta	27
Sydney	–
New York	÷9
Miami	20
Los Angeles	17
Meksikobýur	11
Panama	30
La Paz	8
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	29

Vestfalskyrrindi

14. januar: Fyrra kvarter
19. januar: Mánin næstur jørðini
21. januar: Fullmáni

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp	sp	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp	sp	Hestfirði/Sundalagnum fp	sp	Vestmannasundi fp	sp	Mykinesfirði fp	sp	Nólsoyarfirði fp	sp	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp	sp	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp	sp	Kalsoyarfirði/Svínoyarfirði fp	sp	Hvannasundi fp	sp	Fugloyarfirði fp	sp
19. jan.	0457	1724	0357	1624	0412	1639	0657	1924	0757	2024	0312	1539	0212	1439	0512	1739	0612	1839	0442	1709	0557	1824
20. jan.	0550	1812	0450	1712	0505	1727	0750	2012	0850	2112	0405	1627	0305	1527	0605	1827	0705	1927	0535	1757	0650	1912
21. jan.	0634	1854	0534	1754	0549	1809	0834	2054	0934	2154	0449	1709	0349	1609	0649	1909	0749	2009	0619	1839	0734	1954
22. jan.	0714	1933	0614	1833	0629	1848	0914	2133	1014	2233	0529	1748	0429	1648	0729	1948	0829	2048	0659	1918	0814	2033

Sosialurin
www.sosialurin.fo

TURRIKLÆÐI, HÚGVUR, T-SHIRT, KEPPAR og FLØGG



12. MAÐUR
Tlf. 213212